# Gráa Gullið

JØRGEN NICLASEN
formaður
Fólkafloksins

Føroyum vantar arbeiðsmegi. Vit mugu hava útlendsk arbeiðsfólk higar til lands, er orðalagið. Ímeðan hava vit skipanir, sum beinleiðis forða føroyingum at sleppa til arbeiðis. Pensionistar og fólk við fyritíðarpensión liva undir skipanum, sum halda teimum vekk frá arbeiði.

**67 ár so heim**
Nógvir almennir stovnar hava sum reglu, at á tínum 67 ára føðingardegi er uppsagnarbrævið í postkassanum. Hetta er burturvið. Hesin pensjónsaldur hevur sín uppruna í 1950-árunum, tá fólkapensjónin kom, og tá fólk blivu í meðal 67 ára gomul.

Eisini í kreppuni skortaðu arbeiðspláss, og 67-ára aldursmark loyvdi yngri fólki við familju og húsum at sleppa til arbeiðis.

Men alt hetta er nú broytt. Vit liva 10 ár longur í meðal, og mong hava heilsu og hug til at halda fram at arbeiða eftir 67 ára aldur.

Fólkaflokkurin hevur sum stavnhald, at fólk skulu hava rætt til pensión, tá tey gerast 67 ár, um tey ynskja tað. Men tey skulu hava rætt at arbeiða meir, um tey heldur velja tað.

Eisini skulu fólk hava rætt at arbeiða niðursetta tíð á eldri árum. Sjálvandi skulu fólk verða á arbeiðsmarknaðinum so leingi tey orka og vilja tað.

**13 av hvørjum 100**
Næsta forðingin fyri arbeiði eftir pensjónsaldur er mótrokning í pensión. Tá ein pensionistur hevur forvunnið gott kr. 54.000, verður viðbótin minkað.

Fyri hvørjar 100 kr, pensjónisturin forvinnur, verða 60 kr. trektar av pensiónini. Kommunuskatturin fer við um 20 krónum, alt eftir bústaði, og landsskatturin tekur at byrja við 7 krónur. Nú eru 13 krónur eftir til pensionistin sjálvan.

Hetta líkist ongum, heldur Fólkaflokkurin og má broytast.

Somuleiðis er støðan hjá teimum mongu við skerdum førleika, tvs fólki, ið móttaka fyritíðarpensión. Landstýrið hevur nú boðað frá, at ætlanin er at broyta mótrokningina í fyritíðarpensión soleiðis, at mótrokningin skal verða 45 kr. ístaðin fyri tær 60 kr.

Tað merkir, at fólk ístaðin fyri 13 kr, í framtíðini fáa 28 krónir av hvørjum 100 tey forvinna. Her skal framvegis ikki loysa seg at arbeiða.

**Forða teimum tað ikki**
Broytingin má verða størri, meinar Fólkaflokkurin, og hon skal eisini galda pensionistar.

Fólkaflokkurin hevur hug til at lækka mótrokningina í viðbótini og pensjónini úr verandi 60 kr. fyri hvønn tjentan 100 krónuseðil, heilt niður í 30 kr. Tað merkir, at vit á henda hátt fyri landskassans viðkomandi lækka "marginal"skattin úr 60 % niður í 30%.

Hjá øllum, sum hava førleika, skal tað loysa seg at arbeiða. Tað kostar pengar, sigur onkur. Nei, loysir tað seg at arbeiða, fáa vit peningin fleri ferðir innaftur í búskapin og í landskassan.

Hví skal samfelagið skýggja gráa gullið. Her eru nógvar og góðar kreftir, sum samfelagið hevur brúk fyri. Forða teimum tað ikki.

Jú fleiri, ið lyfta hvør sær, jú meiri lyfta vit saman.

# Fekk kr. 200.000,- í endurgjaldi eftir epidural

JÁKUP PETERSEN



Svenska stjórnin gevur kvinnu 200.000 svenskar krónur í endurgjaldi fyri skaða í heilsuverkinum, har ongin feilur er gjørdur.

Tað snýr seg um eina kvinnu sum fekk epidural doyving undir føðing. Eftir føðingina hevur kvinnan havt kroniska pínu og ongin viðgerð er at bjóða.

Málið hevur verið uppi í sjúklingakærunevndini við tí niðurstøðu, at ongin feilur er gjørdur.

Sjúklingartyggingin hevur eisini havt málið, og her varð ikki funnið samband millum viðgerð og skaða og sostatt onki endurgjald.

Klagan varð síðani beind til stjórnina sum fyri fáum døgum síðani gjørdi úrskurð og hevur veitt 200.000 krónur í endurgjaldi til kvinnuna. Avgerðin verður sjálvandi at liggja sum grund fyri líknandi fyribrygdum.

Eg nevni hetta mál sum eitt framhald av míni grein um feilir og skaðar í sjúkrahúsverkinum í Føroyum. Tað er ikki so frægt, at vit hava eina sjúklingatrygging í Føroyum, tíansheldur møguleika fyri at klaga til Landsstýrið.

Hinvegin kenni eg meg sannførdan um, at ein stórur partur av trupulleikunum sum Dimma hesur tikið upp seinastu tíðina hava sína grund í hugburði innan sjúkrahúsverkið. Og her hugsi eg ikki bert um læknar men so sanniliga eisini um leiðslu.

Tað snýr seg heilt eikult um grundleggjandi fólkaskikk. Og her skuldi ikki verið tørvur á psykologum, men vanligari viðring fyri hvørjum øðrum. Tað verið seg starvsfólk, sjúklingar og avvarandi.

Verður hetta so styðjað við tvungnari rapportering av størri feilum, sjúklingatrygging og møguleika at leggja trupulleikan inn fyri hægri fyrisiting, so meti eg, at nógv kundi verið vunnið. Lat okkum byggja eina skipan, har vit viðurkenna, tá alt ikki hevur gingið eftir ætlan og geva sjúklingum lættari møguleika fyri endurgjaldi.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# Atsókn á Orð Guds

WILLIAM DAM

Sagt hevur verið, ongum nýtist at verja eina leyvu, lat hana sleppa leys, hon verjir seg sjálv, soleiðis er við Bíbliuni Orði Guds, tað verður standandi og alt annað gongur til grundar, eitt og hvørt mál, ið stríðir ímóti Bíbliunar meginreglu, sum verður borið niðan í tingið, eiga trúgvandi tinglimir at afturvísa og ikki bert sita passivir, eins og var tá andstøðuuppskot bleiv samtykt, handfaringin í málinum átti at verið heilt klár, eingin samgonga við slíkari undirtøku.

Og nú frameftir skal Bíblian (orð Guds) standa fyri skotum, sum vit síggja dagliga í alheimsgerðini. Tað er umráðandi at tinglimir eru vaknir, siga orð á røttum stað, í rættari tíð, Kristus. Hitt livandi orð. Orð einglanna til Mariu, søgd frá av Lukkas lækna, Heilagi Andin, skal koma yvir teg, tí skal eisini hitt heilaga ið føtt verður, kallast.

Sonur Guds (Lukkas 1,35) Kristus spyr jødarnar hvussu teir kunnu trúgva orðum hansara, tá teir ikki trúgva skriftum Mósesar (Jóh. 5,47). Jesus sigur í Getsemane urtagarði, tá flokkurin frá teim elstu varð komin fyri at taka Hann.

Hetta hendir fyri at skriftirnar skulu ganga út (Mark 14.49).

Angisróp Kristusar á krossinum: Gud mín, Gud mín, hví ert tú farin frá mær, er at finna í fyrsta ørindi av Sálmi 22, eftir David.

Faðirin í himli mátti venda sær frá honum, Kristus, sonur Faðirin í himli mátti fullføra verkið aleinaður. »Tað er fullgjørt«, stendur í seinasta ørindi í sama sálmi.

Faðir í hendur tínar gevi eg anda mín er setningur úr Sálmi 31.

Vit síggja týðiliga, alt mátti henda fyri at skriftirnar skuldu ganga út. Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring til rættleiðing, til uppforstran í rættvísi 2. Tim. 3,16.

Øll, sum vilja liva gudiliga í Kristi Jesusi skulu verða atsøkt. 2. Tim. 3.12.

Jesus sigur, tá ið heimurin hatar tykkum, skulu tit vita, at hann hevur hata meg, áðrenn hann hataði tykkum, Jóh. 15.18.

Eingir álítandi upplýsingar eru um Kristus uttanfyri Bíbliuna, tískil ber ikki á nakran hátt til at taka ímóti Honum, uttan so, at vit góðtaka orðini fyri sonn, sum Bíblian ognar honum.

Samuel, staðfestir leiðir Harrans yvirfyri Eli. Eg, Harrin, havi kunngjørt honum (Eli) at eg skal døma hús hansara til ævigar tíðir - afturfyri ta misgerð, at hann visti, at synir hansara drógu bann oman yvir seg og kortin ikki av álvara setti at teimum, 1. Sámuelsbók 3,13.

Harrin rópti, Sámuel! Sámuel! Og Sámuel svaraði: Tala Harri - tænari tín hoyrir 1. Samuelbók 3.9.

Harrin segði við Sámuel: Nú skal eg gera nakað í Ísrael, sum skal fáa tað at ringja fyri báðum oyrum álra teirra, ið hoyra um tað, 1. Samuelsbók 3.11.

Vit síggja greidliga at skriftirnar Orð Guds eiga at verða tiknar til eftirtektar og verða alt avgerandi.

26.09.07

DEKKMASTER.FO

Umframt nevndu felgur/dekk kunnu vit bjóða hópin av øðrum spennandi felgum og dekkum til ógvuliga kappingarførar prísir. **Send ein t-post ella ring og hoyr nærri**

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000




**Razor Black 18"**
Við dekkum
Flott 18" felga. Svartlakkerað við poleraðum, breiðum kanti.
Fæst til flestu bilar

**5-Star 17"**
Við dekkum
Klassisk 5-stjørna 17" felga.
Fæst til flestu bilar

**Boston 19"**
Við dekkum
Fantastiska flottar felgur í hypersilver. Á goymslu í 5x112 til VW, Audi, Seat.

**New RS4 18"**
Við dekkum
Original-look felgur til VW/Audi. Búmerki eru við.